## DAGSINS MEINING

# Hvar standa vit?

Sunnudagin 19. oktober var altjóða barnahjálpardagur. Í hesum sambandi hevði ST heitt á øll heimsins lond um at gera eitt munagott átak til tess at tryggja øllum heimsins børnum skúlagongd. Milliónir av børnum í Triðja og Fjórða heiminum sleppa als ikki í skúla ella fáa bert eitt eiti av skúlagongd. Í grannalondum okkara var nógv gjørt burturúr við innsavningum og almennum játtanum til teir altjóða grunnar, ið virka fyri at tryggja børnum í fátæka partinum av heiminum eitt minstamát av skúlagongd. Grannalond okkara seta stórar upphæddir av burtur av teirra játtanum til menningarhjálp.

Tað var í hesum sambandi sera áhugavert, at útvarpið í síðstu viku setti fokus á okkara menningarhjálp. Víst varð á, at hóast Føroyar skjalprógvað er ríkasta land í Norðurlondum lata vit ikki meira enn 6 krónur fyri hvønn føroying í menningarhjálp. Upp í móti hesum varð settur tann beiski veruleiki, at sviar lata 1400 kr. pr. Danir lata yvir 2000 kr. Hesi viðurskifti áttu at givið okkum øllum nakað at hugsa um.

Hvar standa vit sostatt í mun til okkara grannar, tá um menningarhjálp ræður? Vit hava á okkara fíggjarlóg 300.000 kr. og hetta svarar sum longu nevnt til, at hvør føroyingur letur seks krónur og trýati oyru um árið í menningarhjálp. Er hetta ein sømilig upphædd fyri ríkasta land í Norðurlondum? Svarið kenna øll. Vit hava áður víst á, at okkara ríkidømi er ójavnt býtt millum føroyiingar. Vit kunnu nú leggja afturat, at hetta ríkidømi er enn meira ójavnt býtt millum okkum "ríku" og heimsins fátøku fólk. Ikki bert løgmaður, sum umsitur menningarhjálp, eigur at hugsa um hesi viðurskifti. Vit eiga øll at hugsa um hesi viðurskifti og serstakliga tey, sum í hesum døgum sita og viðgera fíggjarlógina fyri 2004. Tá um privata hjálp til neyðstødd ræður, eru føroyingar í fremstu røð. Hví so ikki eisini, tá talan er um almenna menningarhjálp? Okkara almenna menningarhjálp er á so lágum støði, at tað beinleiðis er skomm. Men enn eru tíð og høvi at bøta um hetta, og eiga vit tá vit fara undir at bøta um skommina at hava børnini í fátæka partinum av heiminum fremst í huga.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Dagligu fjølmiðlahvørvisjónir í Føroyum

**Hans Birgir Hansen**
*PS. Biggi í Havnini*

Bløðini og útvarpini og sjónvarpini í Føroyum viðgera dagligu hvørvisjónir, í tíðindum og aktuellum, ið er komandi og farandi, ið fólki skjótt gloymir, ið fellur í gloymskunar hav.

Eg eygleiði, filosoferi, granski, lesi, alt av áhuga, og fái síðan samanfata tað, ið ein sær og hoyrir og kennir á sær, hvat fer at henda uttanlands/heima, ið rakar allar føroyingar.

Tað er ótrúligt dagliga at síggja og uppliva øll gerast dølsk, sløv og tá hesi ikki læra seg at lurta eftir, hvat ið sagt verður við tey, ið ikki nýta sítt umhugsni, áðrenn tey vilja svara aftur.

Tað er væl einki at siga til, tá ið øll eru fjøtrað, heiladálkað, vaskað, indoktrinerað í sinnalagnum, ið skapar fortreytir/grundarlagi fyri vrangfatanir, hugsanir hjá føroyingum.

Tað er fakfólkið innan barnaansing, uppaling, frálæru, undirvísing, barnagarðar, frískúlar, hægri skúlar, lærustovnar, ið er høvuðsupprunin til alt ið ein greiðir frá.

Tað er alt grundleggjandi skeivt og órættvíst skipað úti í øllum kommunum, og soleiðis sum føroyingar í síni heild liva og virka sum programeraðir robottar hjá valdsharrum v. fl.

Øll egoistisk og matrialistisk hugsandi og líkasælu mótvegis teim brekaðu, menningartarnaðu, gomlu, sjúku, veiku í samfelagshøpi, eru einki øðrvísi enn øll omanfyri nevndu.

Tað er gott at ein kennir øll síni medmenniskju og kennir teirra uppruna ið ein sær og hoyrir og kennir á sær og fær avvápna øll ið vilja lata sína misnøgdir raka ein í Havnini.

Undirhaldið í bløðum, útvarpum, sjónvarpum, setir ikki nakað fjøltátta virksemi ígongd, ið gevur føroyska búskapin í dag fleiri bein at standa á, tá ið talan er um mentan og list.

Tað er troyttandi við øllum endurtøkum í bløðum, útvarpum, sjónvarpum, í diskrimineraða viðskiftafólkið, ið ikki vera eins viðfarin av blað- og fjølmiðlastjórum og fólkum í dag.

Eg haldi ikki útgangsstøðið hjá bløðum, útvarpum, sjónvarpum og fólki ið arbeiða, starva innan hesi er tað rætta, tá ið tað ikki tekur støði út frá livikorum arbeiðandi verkafólki.

Tað er ein rættulig kollvelting hend síðani ein av fyrstan tíð bleiv digin av bløðum, síðan útvarp og sjónvarp og hvørs ein hevur møtt nógva mótstøðu frá teim her í Havnini.

Eg havi eisini ligið undir brot á donsku grundlógina §77 um tali- og skrivifrælsi undir ábyrgd av dómstólum og fyribyrgjandi reglur og sensur ið hesi hava framt ímóti mær.

Eg verið viðfarin øðrvísi av teim, tað bæði sær og upplivir ein jú dagliga, tá ið einum verður sett øðrvísi treytir, enn tá ið talan er um onnur skrivandi og talandi føroyingar í dag.

Tað kann ikki sigast at bløðini, útvarpini, sjónvarpini eru frí og fræls ið stýrd vera av stórkapitalistum og ikki av teimum ið gjalda fyri bløðini, útvarpini, sjónvarpini í Havnini.

# Ljós í Gundadali

TÍÐINDASKRIV

Nú kvøldini gerast myrk og long, er høvi hjá einstaklingum og feløgum í Tórshavnar kommunu at íðka ítrótt ella renna sær ein túr á niðara vølli í Gundadali.

Frá mánakvøldinum 20. oktober 2003 eru ljósini á vøllinum tendraði til kl. 22.00.

Tórshavnar kommuna ætlar at hava ljósini tendraði hvørt gerandiskvøld í vetur.

# Oddvør Johansen á Klaksvíkar bókasavni

TÍÐINDASKRIV



Týskvøldið 28. oktober kl. 19.30 verður bókakvøld á Klaksvíkar bókasavni við rithøvundinum Oddvør Johansen.

Oddvør Johansen fer hetta kvøldið at tosa um skaldskap sín. Hon hevur givið fleiri skaldsøgur og stuttsøgusøvn út og er millum teir mest lisnu rithøvundarnar í Føroyum.

Oddvør Johansen spennir víða í sínum skaldsøgum. Í skaldsøguni "Í morgin er aftur ein dagur" er tað Havnin fyrst í 20 øld, ið verður viðgjørd, meðan tað í skaldsøguni "Tá ið eg havi málað summarhúsið" eru avleiðingarnar av kreppuni fyrst í 1990'inum í verða viðgjørdar. Eisini hoyra vit í hesi skaldsøguni um rúsevnistrupulleikar, - eitt evnið, ið ikki hevur verið frammi fyrr í føroyskum skaldskapi.

Oddvør Johansen hevur fingið fleiri virðislønir, millum annað fekk hon í 2001 M. A. Jacobsens Bókmentavirðislønina fyri bókina "Tá ið eg havi málað summarhúsið".

Á bókakvøldinum verður eisini høvi hjá áhoyrarunum at seta høvundinum spurningar. Eisini verður kaffi við onkrum góðum afturvið at fáa.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Katrin Petersen sagt seg úr starvi

**Katrin Petersen hevur gjørt av at fara úr starvi sínum í Sjónvarpi Føroya frá 1. november. Mest av persónligum orsøkum, sigur hon**



*Katrin Petersen hevur sagt seg úr starvi sum virkandi mentanarleiðari í Sjónvarpi Føroya*

STARV
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Frá 1. november er Katrin Petersen ikki longur eitt av starvsfólkunum í Sjónvarpi Føroya. Hon hevur gjørt av at fara úr starvi sínum sum virkandi mentanarleiðari á stovninum.

– Tað er mest av persónligum orsøkum. Eg vil hava meiri frælsi yvir mína egnu tíð, sigur Katrin, sum nú hevur ætlanir um at satsa meira upp á free-lanse arbeiði.

– Og so fái eg eisini betri stundir til at vera saman við soni mínum, og samstundis ráði eg sjálv fyri míni egnu tíð, sigur hon.

Hon leggur dent á, at hon ikki er ónøgd við nakað í sjónvarpinum ella nakað.

– Eg eri helst nakað impulsiv. So tá eg taki eina avgerð, so er tað her og nú, sigur hon.

Katrin røkti starvið sum mentanarleiðari fyri Ivan Niclasen, sum er í farloyvi. Men hann kemur aftur í tað starvið tann 1. november, tá Katrin fer.

Fyri framman hjá Katrini liggur sum sagt ikki nakað fast. Hon vil bara sleppa at royna seg sum free-lansari, og hon vísir samstundis á, at tað gera fleiri og fleiri fjølmiðlafólk í dag.

# Størsta verkið hjá Føroya Symfoniorkestri

**Á konsertini 26. oktober fer Føroya Symfoniorkestur at framføra stórsta verkið, sum nakrantíð hevur verið á skránni hesi tjúgu árini, orkestrið hevur verið til. Framførd verður Symfoni nr. 5 í e-moll, opus 64 av Pjotr Tschaikowsky**



*Solistur er Jóhannes Andreasen og dirigentur er Bernhard Wilkinson*

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Pjotr Tschaikowsky hevur skrivað 6 symfoniir og verður roknaður sum ein av teim stóru symfonikarunum. Føroya Symfoniorkestur hevur hesa ferð sett sær fyri at framføra 5. symfoni í e-moll, opus 64, av hesum stóra tónaskaldi, og er hetta ivaleyst størsta avbjóðingin, orkestrið higartil hevur sett sær, og er helst eisini størsta symfoniska verk nakrantíð, framført her á landi.

Helst hevur Tschaikowsky møtt Grieg í Leipzig 1888, tá hann fær hugskotið til hesa symfoni. Hann hevði annars ikki skrivað nakra symfoni seinastu 11 árini, so hann helt, at hann hevði ikki fleiri hugskot og var »úttømdur«, sum hann tók til. Men fyrsta hugskotið stavar frá hesi tíðini, tá teir báðir møtast, og Tschaikowsky sigur, at tað finnast leivdir av Grieg í hesi symfoni - tí hann hevur á munni, at »vakrari enn Grieg dugir eingin at syngja«.

**Mest spælt**

Hóast symfoniin ikki hevði serliga góða móttøku, fyrstu ferð hon varð framførd í St. Pætursborg, so er hon í dag hansara best umtókta og mest spælda. Symfoniin hevur fýra satsir og byrjar við einum tema í klarinettini saman við djúpu strúkarunum. Hetta er tað sonevnda »lagnutemaið«, sum, eins og í Lagnusymfoni Beethovens, kennist aftur í øllum satsunum og at enda íseinasta satsi verður broytt úr moll í dur.

Eftir inngangin kemur Allegro con anina, eitt synkoperað, eitt sindur dreivandi tema, sum er høvuðstemaið í satsinum. Sum mótsetningur koma aftur nøkur synkoperaði hugarensl í valstakt, men satsurin endar við høvuðstemanum, heldur dartandi ella fjáltruskotið.

Annar satsur Andante cantabile er eitt av vakrastu løgunum fyri waldhorn í symfoniska litteraturinum. Her sýnir Tschaikowsky sínar serligu melodiskapandi gávur; ein kærleikans elegi, sum onkur tónaummælari hevur tikið til.

**Drongur syngur**

Triði satsur er ein yndisligur valsur, Allegro moderato, sum lutvís byggir á eitt vísulag, sum Tschaikowsky hoyrdi ein 10-12 ára gamlan drong syngja í einari av gøtunum í Firenze í Italiu. Eisini her hoyrtist »lagnutemaið«, hóast veikari og ikki so hóttandi, men mest sum ein færri.

Fjórði satsur, Inngangur, Andante maestoso, við »lagnutemanum« í dur og umgjørt, so lurtarin hevur eina kenslu av einum russiskum sálmi. Hetta verður brotið av einum Allegro vivace, sum næstan kann nevnast sum ein russiskur fólkadansur. Men tað er hetta broytta lagnutemaið, sum merkist gjøgnum allan satsin, sum endar í triumf ellar sigursælu.

Umframt Tschaikowsky, verður eisini framførd Festouvertura og Klaverkonsert nr. 2 av Dimitri Schostakowitsch. Solistur er Jóhannes Andreasen og dirigentur er Bernhard Wilkinson.

Verið vælkomin í Norðurlandahúsið í Føroyum til eina áhugaverda musikalska uppliving við Føroya Symfoniorkestri sunnudagin 26. oktober klokkan 16:00 2003